## Campbell til United



Enska The Sun skrivar í dag, at Manchester United helst fer at skriva sáttmála við 35 ára gamla Sol Campbell. Campbell, sum hevur eina fortíð í Tottenham, Arsenal og Portsmouth, skrivaði í summar undir sáttmála við Notts County, men fáar vikur seinni segði spælarin sjálvur sáttmálan upp. Nú er semja gjørd við felagið, soleiðis at Campbell er leysur maður, og tað skal hava fingið Alex Ferguson at venda sær til royndа verjuspælaran, nú ensku meistararnir hava stórar trupulleikar í verjupartinum. Har hava skaðar nevnliga við sær, at hvørki Rio Ferdinand, Nemanja Vidic, Wes Brosn, Gary Neville, Honny Evans ella John O'Shea eru tøkir.

## Føroyingar kunnu stuðla brøðratjóðum

Noreg og Svøríki fara saman at bjóða sær til at verða vertir fyri EM-endaspælinum í fótbólti í 2016. Og nú býðst høvið hjá øllum føroyskum internetsbrúkarum at stuðla norðurlendsku brøðratjóðunum, Noregi og Svøríki í royndunum at gerast vertstjóðir fyri EM-endaspælinum í 2016. Hetta kann gerast við at fara inn á heimasíðuna www.supportthebid.com - longu nú hava næstan 6.000 internetsbrúkarar víst sín stuðul til Svøríki og Noreg. Tað verður eisini stutt og lætt hjá føroyingum at ferðast til EM-endaspælið í 2016, um Noreg og Svøríki verða vertir tá.

# Gamla daman heilkiksaði

**Juventus var á odda, men nervarnir spældu teimum eitt puss, tá Bayern München vann stórsigur í Torino, og í bólki B eydnaðist tað CSKA Mosvka at sníkja seg fram um týsku meistaranar úr Wolfsburg**




Jákup Mørk

Týska stórfelagið var í trongum skóm undan dystinum. Men sum tað sømir seg einum týskum liði, so reistist Bayern, tá mest stóð á.

Trezeguet hevði annars lagt Juventus á odda, soleiðis at teir stevndu móti knockout-partinum av Champions League, men so setti Bayern ferð á.

Juventus líktist ikki longur einum stórfelag, eftir at Hans Jörg Butt, málverjin hjá Bayern! hevði javnað til 1-1 við brotssparki. Óttin fyri eini fiasko køvdi mest sum alt initiativ hjá Gomlu damuni, og í seinna hálvleiki sat Bayern fullkomuliga á dystinum. Og við málum frá Olic, Gomez og Tymoschuk fekk Bayern staðfest við stórum bókstavum, at teir framvegis eru eitt felag, sum roknast skal við.

### Heitur Owen

Í bólki B lá tað mesta til høgrabeinið hjá Wolfsburg, sum á heimavølli kundi spæla seg víðari við sigri á einum Manchester United í B-uppstilling, nú ensku meistararnir longu hava spælt seg víðari.

Hetta eydnaðist tó ikki hjá Wolfsburg, og tað var einamest einum manni fyri at takka. Spurnartekinini kring Michael Owen vóru annars fleiri, tí hann í summar gjørdi av at fara úr niðurflutta Newcastle til Manchester United, men við trimum málum í gjár prógvaði hann, at málskógvarnir eru um at verða heitir.

Og tá CSKA Moskva so samstundis tók øll stigini við sær úr útidystinum móti Besiktas, vann russiska liðið seg víðari úr bólkaspælinum.




David Trezeguet var maðurin, sum skeyt Juventus upp á 1-0, men saman við liðfeløgunum kundi hann bara iðra seg, tá Juventus eftir eitt vánaligt avrik mátti leggja rygg til størsta europiska tapið í søgu felagsins
Mynd: Polfoto/AP

**Støðan í bólkaspælinum**

**Bólkur A**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Bordeaux | 6 | 5 | - | 1 | - | 0 | 9 | 2 | 7 | 16 |
| 2 Bayern München | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 9 | 5 | 4 | 10 |
| 3 Juventus | 6 | 2 | - | 2 | - | 2 | 4 | 7 | -3 | 8 |
| 4 Maccabi Haifa | 6 | 0 | - | 0 | - | 6 | 0 | 8 | -8 | 0 |

**Bólkur B**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Manchester Utd. | 6 | 4 | - | 1 | - | 1 | 11 | 6 | 5 | 13 |
| 2 CSKA Moskva | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 10 | 10 | 0 | 10 |
| 3 VfL Wolfsburg | 6 | 2 | - | 1 | - | 3 | 9 | 8 | 1 | 7 |
| 4 Besiktas | 6 | 1 | - | 1 | - | 4 | 3 | 8 | -5 | 4 |

**Bólkur C**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Real Madrid | 6 | 4 | - | 1 | - | 1 | 15 | 7 | 8 | 13 |
| 2 AC Milan | 6 | 2 | - | 3 | - | 1 | 8 | 7 | 1 | 9 |
| 3 Marseille | 6 | 2 | - | 1 | - | 3 | 10 | 10 | 0 | 7 |
| 4 FC Zürich | 6 | 1 | - | 1 | - | 4 | 5 | 14 | -9 | 4 |

**Bólkur D**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Chelsea | 6 | 4 | - | 2 | - | 0 | 11 | 4 | 7 | 14 |
| 2 FC Porto | 6 | 4 | - | 0 | - | 2 | 8 | 3 | 5 | 12 |
| 3 Atlético Madrid | 6 | 0 | - | 3 | - | 3 | 3 | 12 | -9 | 3 |
| 4 Apoel Nicosia | 6 | 0 | - | 3 | - | 3 | 4 | 7 | -3 | 3 |

**Bólkur E**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Fiorentina | 5 | 4 | - | 0 | - | 1 | 12 | 6 | 6 | 12 |
| 2 Lyon | 5 | 3 | - | 1 | - | 1 | 8 | 3 | 5 | 10 |
| 3 Liverpool | 5 | 2 | - | 1 | - | 2 | 4 | 5 | -1 | 7 |
| 4 Debrecen | 5 | 0 | - | 0 | - | 5 | 5 | 15 | -10 | 0 |

**Bólkur F**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Barcelona | 5 | 2 | - | 2 | - | 1 | 5 | 2 | 3 | 8 |
| 2 Rubin Kazan | 5 | 1 | - | 3 | - | 1 | 4 | 5 | -1 | 6 |
| 3 Inter | 5 | 1 | - | 3 | - | 1 | 5 | 6 | -1 | 6 |
| 4 Dynamo Kiev | 5 | 1 | - | 2 | - | 2 | 6 | 7 | -1 | 5 |

**Bólkur G**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Sevilla | 5 | 3 | - | 1 | - | 1 | 10 | 4 | 6 | 10 |
| 2 Unirea Urziceni | 5 | 2 | - | 2 | - | 1 | 7 | 5 | 2 | 8 |
| 3 Stuttgart | 5 | 1 | - | 3 | - | 1 | 6 | 6 | 0 | 6 |
| 4 Rangers | 5 | 0 | - | 2 | - | 3 | 4 | 12 | -8 | 2 |

## Fakta um Champions League

### Úrslit týskvøldið

**Bólkur A**

| | |
|---|---|
| Juventus-Bayern München | 1-4 |
| Maccabi Haifa-Bordeaux | 0-1 |

**Bólkur B**

| | |
|---|---|
| Besiktas-CSKA Moskva | 1-2 |
| VfL Wolfsburg-Manchester United | 1-3 |

**Bólkur C**

| | |
|---|---|
| FC Zürich-AC Milan | 1-1 |
| Marseille-Real Madrid | 1-3 |

**Bólkur D**

| | |
|---|---|
| Atlético Madrid-Porto | 0-3 |
| Chelsea-Apoel Nicosia | 2-2 |

### Dystir mikukvøldið

**Bólkur E**

Liverpool-Fiorentina
Lyon Debrecen

**Bólkur F**

Dynamo Kiev-Barcelona
Inter-Rubin Kazan

**Bólkur G**

Sevilla-Rangers
VfB Stuttgart-Unirea Urziceni

**Bólkur H**

Olympiakos-Arsenal
Standard Liege-AZ Alkmaar